## DAGSINS MEINING

# Tjóðarhátíðin

Hóast danska stjórnin noktar fyri, at vit eru ein tjóð, so ivast eingin føroyingur í, at í dag og í morgin halda vit tjóðarhátíð okkara. Neyvan naøkur onnur tjóð hátíðarheldur tjóðardagin so merkisvert, sum vit føroyingar gera tað.

Meðan aðrar tjóðir halda ein grundlógardag ella ein frælsisdag, halda vit dagin til minnis um deyða Ólavs hin Heilaga. Hesa náttina vaktu norðbúgvar – Ólavs Vøka – men nú eru tað bara føroyingar og eitt sløð av norðmonnum sum hátíðarhalda ólavsøku.

Ólavsøkan sigur tí nakað um, at føroyingar eru siðbundnir. Tað sigur okkum nakað um, at vit eru ein menta tjóð og ólavsøkan sigur okkum sanniliga eisini nakað um samleika føroyinga. Hesa hátíð eru vit øll føroyingar, so tað stendur eftir. Ja, mangur útlendingur skilir tað ikki, at til hesa hátíð stevnir meiri enn annar hvør føroyingur til høvuðsstaðin, og kanska ein fjórðingur er í tjóðarbúna okkara.

Men ólavsøkan er sanniliga eisini nakað av eini andsøgn. Samstundis sum hon er nakað av tí mest hátíðarliga, vit kunnu hugsa okkum, so er hon sannliga eisini ein veitsla við slíkum háttalagi, at vit ofta hava hug at venda bakið. Í so nógv rennur niður um hjá summum, men seinastu ólavsøkurnar benda kanska á, at føroyingar eru vorðnir meiri “vaksnir” seinastu árini.

Tjóðarhátíðiner tíbetur ikki bara ein hátíð við tí politiska og kirkjuliga. Hon er sanniliga ein mentannarstevna og ítróttarstevna, so tað rungar eftir í. Og tað er alt hetta – kappróður, møtini, fótbóltur, tombola, setanin, skrúðgongan, guðstænastan og løgtingssetanin – sum ger ólavsøkuna til nakað heilt serligt.

Men nógv – serliga foreldur – hava ampa, tí ólavsøkan kostar eisini. Krøvini eru stór, og felagsskapir dúva jú eisini uppá at fáa pening til felagsarbeiðið. Tað er í finasta lagi, men tað skerst ikki burtur, at sumt kenst í so handilsligt. So nógv sum møguligt skal fáast burturúr teimum neyðars børnum. Á hesum øki átti felagsskapr heldur lagt dent á, at børnini og tey ungu fingu eina uppliving burturúr.

Hóast alt – ein hátíð, sum vit kunnu vera fegin um. Góða ólavsøku øll somul!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Minnisveik?

**Tormóður Stórá,**
*lækni*

Hoyrdi herfyri í Útvarpinum um hugtakið ”minnisveik”, í sambandi við, at ætlanin var at byggja hús til hesi í Havn og at felag skuldi stovnast fyri minnisveik. Tað bleiv eisini útgreinað, at minnisveik var tað sama sum ”dement ella senil dement” fólk, og áðurnevnda felag skal arbeiða fyri at bøta um korini hjá hesum. Alt gott um tað ! Tað sum eg hefti meg við, var sjálvt orðið ”minnisveik”, sum eg ikki havi hoyrt áður í hesum týdninginum og sum allarhelst er nýtt.

Haldi tó ikki, at hetta orðið á nakran hátt er nøktandi at lýsa tilstandin ”demens”. Tað er rætt, at minnið er ein týðandi partur av demensi, og serliga hetta at minnið viknar í stóran mun hjá fólki, sum frammanundan vóru púra frísk. Sostatt hevði orðið ”minnisviknað” verið nakað betri, men heldur ikki nøktandi.

Sjálvt orðið ”demens” kemur úr latíni, samansett av de + mens. ”Mens” merkir sinnið, og ”de” merkir frá (burturi frá). Danska beinleiðis merkingin er ”afsindig” , sum í føroyskari merking er at vera ”ørur” ella ”vitleysur”. Í donsk-føroysku orðabókini verður ”dement” kalla’ ”sálarliga viknað”, sum í grundini er rættuliga nøktandi fyri tey tekin sum demensur umfatar.

Tað er nevniliga ikki nóg mikið, at ein hevur vánaligt ella viknað minni, til at geva sjúkuavgerðina ”demens”. Flestu eldri fólk kunnu greiða frá, at minni teirra er viknað, men tey eru ikki dement fyri tað.

Skal sjúkuavgrðin demensur takast, so er neyðugt, at ein, umframt at vera minnisviknaður, eisini hevur onnur tekin um sálarliga viknan. Tað kann snúgva seg um t.d. trupulleikar at læra nakað nýtt, umfatandi trupulleikar við sjálvum hugsingarháttinum, manglandi evni til at abstrahera, talutrupulleikar, viknaði evni til at skyna á og taka sær av sær sjálvum, og eisini kensluligar broytingar henda. Tað fer eisini fram ein broyting í sjálvari persónligheitini (muruni), sum ger at tann dementi í atferð síni ikki er til at kenna aftur. Júst hesi seinast nevndu tekin eru tey, sum hjá teimum avvarðandi kennast svárast og sum gera at tann sjúki tørvar serliga nógva hjálp. Tí er heitið ”minnisveik” ikki serliga nøktandi, tí tað bara lýsir ein brotpart av teimum trupulleikum, sum eru. Hugtakið úr orðabókini ”sálarliga viknað” ella “sálarviknað” ella kanska orðið ”sinnisviknað” eru avgjørt meira lýsandi, um vit skulu hava eitt føroyskt orð fyri demens.

Í sama viðfangi kann kanska vera hóskandi at vísa á, at ”demensur” sum so ikki er ein sjúka, men nøkur tekin um, at ein er sjúkur. Tað finnast fleiri enn 100 sjúkur, sum kunnu gera at eitt fólk verður dement. Summar av hesum sjúkum kann ein sum so ikki gera nakað við, men hildið verður, at um 10-15 % av teimum, sum hava demenstekin, hava sjúkur, sum kunnu viðgerast so at tey ikki longur eru dement. Tað er tí, at tað er so umráðandi, at fólk, sum hava tekin til demens, verða nærri kannaði. Tað er eisini umráðandi at hava í huga, at demensur ikki er ein náttúrligur partur av teimum broytingum, sum koma við aldrinum. Tí er eisini hugtakið ”senil dement” burturvið og eigur ikki at verða brúkt longur, tí hetta sigur, at ein er dementur av elli (”senium” út latíni merkir ”elli”). Tað er rætt, at tey flestu dementu eru gomul, men tey flestu gomlu eru ikki dement. Fleiri av sjúkunum, sum elva til demens, eru serliga at finna hjá eldri fólki, men ein kann gerast dementur á ungum árum eisini. Tað var fyrr vanligt (men skeivt) at uppfata demens sum eitt náttúrligt ellistekin, og tí eru tað framvegis alt ov mong, sum hava demens tekin, sum ongantíð verða kannaði, men bara fáa at vita, at tað hevur nakaði við aldurin at gera.

Tað er tí kærkomið, at fólk taka seg saman til at bøta um korini hjá teim dementu og økja um almannavitanina um demens, men haldi vit skulu nýta eitt meiri nøktandi orð enn ”minnisveik”, um vit ikki skulu kalla tað demens.

# Vandamikið at stoyta heitt í plast

**Heilsufrøðiliga starvstovan ávarar ímóti at stoyta heita saft ella annan heitan løg í plasfløskur**

**ÁVARING**
*red*

Tað er ikki ráðiligt at stoyta nýgjørda saft frá berunum, tú hevur heintað av berjarunninum, í plasfløskur.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan ávarar í tíðindaskrivi ímóti hesum, tí at vandi er fyri, at vandamikil evni úr plastinum, fløskan er gjørd av, koma út í saftina.

– Sodavatnsfløskur úr plasti eru ikki egnaðar til heita saft ella aðrar heitar drykkir. Tí eigur heit saft og súltutoy at verða latin í glasfløskur, boðar Heilsufrøðiliga Starvstovan frá.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.